# Fekk fría atgongd til kontoir hjá fyritøku

**KT-UMLEGGING** Enn eitt grefligt dømi um feilir í samband við umleggingina av netbankunum er komið fram. Hesaferð fekk ein kundi brádliga atgongd til kontoir hjá fyritøku, har hundraðtúsundavís krónur stóðu á. – Manuellur feilur, sigur Marner Jacobsen, stjóri í Eik




*Fleiri kundar hjá bankunum hava í seinastuni havt líknandi mynd á skerminum, har helvtin ella kanska ongin av kontunum eru teirra egnu. Eitt sindur óheppið, kanska serliga tá fleiri hundraðtúsund krónur hanga í leysari luft*

Rógvi Nybo

– Nýggja KT-skipanin er trygg. Avbjóðingar hava verið við umleggingini, men hesar eru rættaðar og øll dáta er komin upp á pláss og trygdin í lagi, staðfestir Eik Banki í tíðindaskrivi til fjølmiðlarnar í morgun.

Men tíðindaskrivið er ikki meira enn komið inn, so hava vit enn eitt feskt dømi um, júst hvussu ótrygg henda skipanin er hjá fyritøkum og brúkarum at vera í.

Ein brúkari av Heimagreiðsluni hjá Eik Banka vísti okkum í morgun á, at tá hann í gjárkvøldið fór inn á Heimagreiðsluna hjá sær, hevði hann brádliga atgongd til kontoir, sum hann als ikki kendist við, og har tað stóðu rættiliga fitt av peningi.

– Tað vísir seg at hetta er ein væletablerað fyritøka, sum eigur hesar kontoirnar, og at eg knappliga havi atgongd til bæði lán og pening hjá hesari fyritøkuni, sigur brúkarin, sum Sosialurin kennir samleikan hjá.

## Skipanini feilar einki

Tá hesin ítøkiligi trupulleikin verður lagdur fram fyri Marner Jacobsen, stjóra í Eik Banka, vil hann fyrst sleppa at kanna málið.

– Í hesum førinum er talan um ein manuellan feil, altso ein feilur frá einum starvsfólki og ikki við skipanini, er svarið, stjórin í Eik Banka kemur við.

Marner Jacobsen greiðir frá, at henda skipanin er bæði forsvarlig og trygg, og at hesin manuelli feilurin einki hevur við trygdina í skipanini at gera.

– Men vit hava havt, og tað mugu vit viðganga, vit hava havt øgiliga stórar innkoyringartrupulleikar. Og tað er soleiðis, at tá mann byrjar upp á eina nýggja skipan, so mugu øll venja seg við hana. Eisini tey, sum skulu hjálpa kundunum og vegleiða teir. Og tað gevur nakrar avbjóðingar, og tað er so tað, sum vit hava roynt at lætt um, so nógv sum gjørligt, og vit gera alt, vit kunnu, fyri at lætta um hjá kundunum. Vit mugu nokk siga, at vit hava undirvurderað, hvussu stór avbjóðingin bleiv við serliga brúkaraupplivilsinum hjá kundunum, sigur Marner Jacobsen.

Hann vísir eisini á, at tá tú skiftir skipan, fer tað altíð at verða ein mánaður ella tveir, sum verða ein innkoyringarfasa, bæði til at kundarnir og starvsfólkini verða von við at nýta skipanina.

## Kennið tykkum trygg

Marner Jacobsen stendur fast við, at tað er eingin skipan í heiminum, sum riggar 100 prosent, men at tað eru eingir grundleggjandi trupulleikar við hesari skipanini, og at kundarnir kunnu kenna seg púra tryggar við at nýta nýggju KT-skipanina, sum bankarnir herfyri tóku í nýtslu.

## Ótryggur tryggleiki

Spruningurin er bert so, hvussu tryggar kundarnir hjá bankunum, bæði fyritøkur og einstaklingar, skulu kenna seg, tá fjølmiðlarnir næstan dag og dagliga síðan umleggingina fáa nýggj dømi um, at fólk ikki hava atgongd til egnar kontoir, samstundis sum onnur hava atgongd til bæði pengar og lán hjá fyritøkum og einstaklingum.

Og tað óansæð, um talan er um feilir í skipanini ella manuellar tastifeilir.

*rogvi@sosialurin.fo*

# Listagluggin mentunarnáttina




*Mentunarnáttina er listaframsýning í Listaglugganum*

Mentunarnáttina er framsýning við fleiri listafólkum, sum sýna fram málningar og vatnlitsmyndir í Listaglugganum, Dr. Jakobsensgøta 15.

Listafólkini sum framsýna eru: Frits Johannesen, Olivur við Neyst, Torbjørn Olsen og Zacharias Heinesen. Framsýningin er opin frá kl. 16.00-22.00.

### Diamantbrúdleyp

Grundlógardagin 5. juni hava Nanny og Franklin Henriksen, Klajksvík, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin á Klaksvíkar Sjómansheimi kl. 16 fyri innbodnum.

### Konfirmatión

Sunnudagin 30. mai verður Teitur Niclassen, sonur Anju Jacobsen og Jón Niclassen, fermdur á Aal kirke í Oksbøl. Dagurin verður hildin heima í Vestparken 85, 6840 Oksbøl.

### Silvurbrúdleyp

Tann 1. juni hava Elsba og Eivind Danielsen verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin 3. juli í B36 húsinum kl. 19. Tey sum vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða vinarligast biðin um at siga frá á tlf. 321932 ella 224802 í seinasta lagi 20. juni.

fk Matseðil

Hósdagin 27. mai
**Spareribs / Kókað neytakjøt**

Fríggjadagin 28. mai
**Millíónbúffur / Medistari / Rullusteik**

Leygardagin 29. mai
**Nakkafillét**

Mánadagin 31. mai
**Fiskafrikadellur / Stokt flesk**

Týsdagin 1. juni
**Krebinettir / Høsnarungabringa**

Mikudagin 2. juni
**Stoktur fiskur / Kjøtfrikadellur**

*Til ber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**